## Laudrup ætlar sær finalusess



Spanska felagið Getafe tóku í gjárkvøldið eitt risafet móti einari møguligari steypafinalu, og venjari felagsins, danin Michael Laudrup, væntar at tað fer at eydnast teimum. Getafe vann 3-1 á heimavølli móti Santander, í fyrstu hálvfinaluni, og harvið er liðið sera tætt einum finalusessi. – Hetta var eitt megnarúrslit, og eg eri sera fegin um mínar leikarar. Teir spældu væl og innsatsurin var sera góður, segði Laudrup á einum tíðindafundi eftir dystin. Hann helt ikki at fyrsti hálvleikur var serliga góður (1-1 í hálvleikinum – blaðm.), men í seinna hálvleiki mentu leikararnar seg, og spælið varð munandi betur. – Vit spældu teir av vøllinum, skoraðu góð mál og megnaðu at halda Santander heilt vekk frá møguleikum. – Møguleikin fyri at náa finalusessinum er sera stórur. Í fótbólti skal man aldrin gleða seg ov skjótt, men í seinnu hálvfinaluni, har Santander noyðist fram eftir vøllinum, hava vit leikararnar, ið megna at spæla kontrafótbólt á hægsta støði. Eg eri optimist, og tessvegna vænti eg mær ein finalusess, sigur Michael Laudrup

# »Kom so útiliðið!«

**Tað ljóðar ógvuliga langt úti. Men tað finnast nøkur viðhaldsfólk í Noregi, sum heppa uppá 13 ymisk fótbóltslið gjøgnum eitt kappingarár. Men hetta passar!**

GREINANAVN
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Enn einaferð er staðfest, at fótbóltur er ikki bara fótbóltur. Talan kann eisini verða um speisemi av ringastu – ella bestu – skuffu, tað velst alt um hvørjar fótbóltsbrillur ein hevur. Í Noregi hongur tað øllum fótbóltsviðhaldsfólkum langt út av hálsinum – bara ikki teimum, sum halda við Rosenborg – at Rosenborg hevur vunnið 14 av teimum seinastu 16 meistaraheitunum. Tað hevur líka eydnast Vålerenga og Brann Bergen at koma ímillum. Hesin dominansurin hjá Rosenborg hevur fyri sovítt eisini fingið stuttligar avleiðingar.

### »Heia Bortelaget«

Tróndheimur er eins og Bjørgvin ein vakur lestrarbýur, sum ungfólk úr øllum Noregi leita til, fyri at fara undir hægri lestur. Í 1992 vóru tað nøkur sálarfrøðislesandi í Tróndheimi, sum blivu so troytt av Rosenborg – hóast tey búðu og trivust í Tróndheimi – at tey tóku tað sjáldsomu avgerð at møta til hvønn heimadyst hjá Rosenborg á Lerkendal Leikvøllinum, fyri at stuðla útiliðnum, mótstøðuliðnum hjá Rosenborg. Tey skipaðu seg í eitt felag, sum sjálvsagt fekk navnið "Heia Bortelaget".

Teir flestu tróndarbúgvarnir hava dugað at tikið hetta serliga átakið hjá "Heia Bortelaget", men summi hava givið ilt av sær, og tá serliga, at tey lesandi hava avsláttarskipannir í Tróndheimar býi, sum vanligir tróndarbúgvar ikki hava.

### Gingið illa

Og sigast má, at tað hevur gingið illa hjá "Heia Bortelaget", hóast teir hava rosalittar troyggjir og fløgg, og turriklæði í sama liti. Og hóast tey eru væl skipað við herrópum, og hava ein limalista, sum telur heili 2.600 fólk. Tí nærlesa vit heimahagtølini hjá Rosenborg síðani stovnan viðhalds/móthaldsfelagsins í 1992, so hevur bara eydnast útiliðunum hjá Rosenborg at vunnið 24 av 338 dystum á Lerkendal Leikvøllinum.

So "Heia Bortelaget" hevur bara eitt eydnisprosental, sum er áljóðandi 7,1%. Ræðandi heimaformurin hjá tróndarbúgvum hevur verið ræðandi hesi 16 árini, og tí hevur tað mangan verið súrt hjá "Heia Bortelaget" at eygleitt málveitslurnar hjá Rosenborg. Men av tí sama hava tey í "Heia Bortelaget" ikki verið noydd at keypa so mong steyp. Tì hvørt útiliðið – hvørt tað eitur Brann, Viking, Vålerenga, Lyn ella




*Fýra psychologi lesandi úr Tróndheimi hava tikið stig til at stuðla útiliðunum, ið javnan vitja Lerkendal leikvøllin. Vinnur eitt útilið fær tað steyp handað frá hesum merkisverda bólki*

Tromsø – sum sigrar á Rosenborg á Lerkendal Leikvøllinum, tað liðið fær eitt ognarsteyp frá "Heia Bortelaget", sum eina áminning um eitt væla avrik. Men í 2005 og 2007 eydnaðist málsetningurin hjá "Heia Bortelaget". Men við teimum pengum Rosenborg eigur á bók, og við tí vinnaramentaliteti og siðvenjum teir hava, so kann væl henda, at "Heia Bortelaget" aftur fær eitt keðiligt kappingarár, sum tey høvdu báðumegin aldarskiftið.

Sig so ikki norðmenn kunnu verða skemtingarsamir.

# Líkist svartasta ongum

**Nú kappingin harðnar alsamt í oddinum á Sunset-kappingini, ilskast suðuroyingar um dystarásetanina hjá Hondbólts-sambandinum** (HSF)

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Áskoðarar hjá VB skilja als ikki, hví Hondbóltssambandið ikki fyri langari tíð síðan hevur sæð trupulleikan við skipanini, og tískil framt neyðugu broytingarnar. Vit fingu orðið á tveir mælskar hondbóltsfjepparar úr Vági, og teir standa spyrjandi og fylgja ruðuleikanum, sum eini teirra valdi at kalla tað.

### Meira vanligt fyrr

Bogi Mortensen, ið er ein av trúgvu áskoðarunum hjá VB gjøgnum nógv ár, og sum eisini hevur tvær døtur á liðnum, hevur valt at úttala seg um, hvussu óheppið hann heldur tað vera, at slíkt kemur fyri.

- Fyrr var tað meira vanligt, at sokallaði dupultvikuskifti vórðu spæld, men hetta er óheppið, og er man frá Hondbóltssambandinum farin alt meira frá hesum. Men í dag standa vit so við einum sera avgerandi vikuskifti fyri framman, og tað er serstakliga óheppið, at avgerandi dystir ikki fáa optimalu umstøðurnar.

- Hetta kann ikki sigast at vera dømið, tá man hevur valt at seta eina liðið at spæla dagin fyri ein so umráðandi og avgerandi dyst, sigur Bogi Mortensen, ið harmast um støðuna í bestu føroysku kvinnudeildini.

### Torført at skipa ørðvísi

Eiler Einarsson, ið er formaður í kappingarnevndini hjá Hondbóltssambandinum metir, at tað er sera torført at skipa kappingina ørðvísi, tí tað eru fleiri instansar, ið skulu samskipa kappingina.

- Tað er ein sera torfør uppgáva, at leggja kappingarnar til rættis, og skal alt ganga eftir vild, eru tað fleiri viðurskifti, ið saman skulu ganga upp í eina hægri eind, sigur Eiler, ið er sera harmur um støðuna undan hesum vikuskiftinum. Samstundis sum hann er harmur um støðuna, sigur hann seg ikki duga at siga, hvat kundi verið gjørt ørðvísi, tí tað er altíð eitthvørt, ið kemur í vegin.